**Allarbesti abbi**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum 1. juni. Takk fyri at tú ert so góður við meg. Heilsa ommu.
**Ynskir Meinhard**





**Góða fitta Elsa**
Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við 50 ára degnum 1. juni. Vit eru so góð við teg. Her ert tú ordiliga í cation í Berjabrekku.
**Kærar heilsanir Sóljubørnini**



Hjartaliga takk til øll, ið mintust meg á konfirmatiónsdegi mínum 1. apríl 2007.
**Heilsan Snorri**

# Varaskúlastjórastarv í Kollafjarðar skúla

**Eitt starv sum varaskúlastjóri í Kollafjarðar skúla verður hervið lýst leyst til setan 1. august 2007.**

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum:**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virkssemi skúlans
- hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi og loyalur
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans

**Harumframt skal varaskúlastjórin:**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokki 32.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skal sendast til

**Kollafjarðar skúla**
att. Karin Hammer
Botnavegi 2, 410 Kollafirði

og skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 14. juni kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvi frá Karin Hammer, skúlaleiðara, á tlf. 302553 ella 221407

**Kollafjarðar skúli** hevur komandi skúlaár uml. 140 næmingar í 1. – 9. flokki og uml. 15 lærarar.

# Venjingarskúlin

handan Á 14 · 100 Tórshavn

## Søkt verður eftir 8 lærarum

- 2 lærarum í fast starv
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 fyri lærara í farloyvi
- 2 lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 fyri lærarar við niðursettari tíð
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 at lesa avlopstímar (endaliga tímatalið verður ikki greitt fyrr enn 1. september 2007)
- 1 lærara til 1. apríl 2008 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi
- 1 lærara umleið 1. februar 2008 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Skúlin hevur brúk fyri fólki, sum kann undirvísa í

Ítrotti, støddfrøði, alis/evnafrøði, handaligum lærugreinum, tónleiki, máli, kunningarlærugreinum, náttúr/tøkni, motorlæru, og sum hava læraraútbúgving, hava góð samstarvsevni, eru opin, kreativ, vilja vera við til at menna skúlan, kunnu átaka sær starvið sum flokslærari og sum eru sinnað at arbeiða í sjálvstýrandi toymi!

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við skúlastjóran, Niels Nattestad á tlf. 302570 ella 213502.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. juni á middegi.

Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 450 næmingar í 19 flokkum og her koma at starvast 37 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 5 sjálvstýrandi toymi: 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8-10 fl. og sertoymi. Skúlin húsast í trimum bygningum: 1. og 2. flokkur halda til á Ytra skúla við Landavegin, 3. fl. á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.

# Venjingarskúlin

handan Á 14 · 100 Tórshavn

## Søkt verður eftir 2 stuðulsfólkum, ávikavist 29 og 31 tímar um vikuna skúlaárið 2007/08 til næmingar við serligum tørvi

Fyrimun hava umsøkjarar við royndum og viðkomandi útbúgvingum.

Løn sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Vit vænta, at tú

- ert fyrikomandi, opin fyri tøttum samstarvi við bæði leiðslu, lærarar og foreldur og vil vera við til framhaldandi at menna skúlan.

Umsóknir

Skulu verða skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2007 á middegi.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlastjóran, Niels Nattestad, tlf. 302570/213502.

Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 450 næmingar í 19 flokkum og her koma at starvast 37 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 5 sjálvstýrandi toymi: 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8-10 fl. og sertoymi. Skúlin húsast í trimum bygningum: 1. og 2. flokkur halda til á Ytra skúla við Landavegin, 3. fl. á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.


FA. GRAVSTEINAR




Opið: mánadag - fríggjadag $9^{00}$-$17^{00}$
annars sambært avtalu.

Nýggj vøruskrá fæst!

Sjónband - 31 77 74



# Ekspetrisa
TIL FÓTBÚNA

Søkt verður eftir fólki m/k at byrja skjótast gjørligt. Starvið er fulla tíð og løn sambært avtalu.

Ring og fá nærri at vita.

EURO SKO Pf. FÓTBÚNI EURO SKO
TRÓNDARGØTA 23 · TLF. 311705